# Fæst nú til keyps kring landið




**Við Tónleiki 2001 ber tað til at koma tættari at føroyskum tónleiki enn nakrantíð áður. Tú sleppur á pallin, aftur um pallin, inn í upptøkuhølini og á ferð uttanlands við bólkum. Tú hittir tónleikararnar, sum tað snýr seg um, og teir siga frá, hvussu teir upplivdu ymsar hendingar í árinum. Eitt umfatandi yvirlit yvir hendingar og útgávur í árinum eru eisini í bókini.**

**Árbókin er 116 síður til støddar, og alt er í litum. Í bókini eru nógvar myndir, sum ikki hava verið frammi áður.**

**Sosialurin & pop.fo**




# Leikhúsjól 2001



*Eftir at ikki hava verið á palli í fjør, fara Leikhúsjól aftur á pall í sjónleikarahúsinum komandi leygardag*
*Savnsmynd*

SJÓNLEIKUR

*Ingrid Bjarnastein*

Nú er tíðin nærum komin, har Leikhúsjól hjá Havnar Sjónleikarafelag er á skránni.

Leikhúsjól er ein afturvendandi leikur hjá Havnar Sjónleikarafelag, tó í nýggjum sniðið hvørt árið.

Tey siga frá Sjónleikarafelagnum, at seinasta hálva árið hava nógv verið inni á gólvinum og spurt, hvussu verður við Leikhúsjólum í ár, tí tað er ein siður, og soleiðis at tað jú at vera.

Leikhúsjól vóru ikki á palli í fjør vegna ótrúliga góða undirtøku av sjónleikinum PIPPI, men fólk gleða seg ómetaliga nógv til Leikhúsjól 2001.

Havnar Sjónleikarafelag hevur i ár Leikbólkin SPÍRAR afturat sær. Tey hava sjálvi skrivað og improviserað seg til orð og leikgongd. Ein skúlabólkur hjá Sjónleikaraskúla Havnar Sjónleikarafelags og Tórhavnar kvøld-og ungdómsskúla setir eisini sín dám á Leikhúsjól í ár.

Sjónleikarafelagið vil ikki beinleiðis avdúka nakað áðrenn frumframsýningina, men við søgum og sangi fara álvar, vættrar, einglar og menniskju at undirhalda børnum, vaksnum, gomlum sum ungum og annars øllum teimum, ið síggja leikin í ein lítlan tíma.

Atgongumerkjasølan er byrjað, og tann fyrsta av 11 sýningum verður leygardagin 8. desember klokkan 15.00. Atgongumerki fáast í Kunningarstovuni og í húsinum ein tíma undan sýning.


